

# Johanna farin til Skotlands

Hóskvøldið fór sluppin Johanna TG 326 til Skotlands. 17 mans eru við og ferðin tekur væntandi umleið 9 – 10 dagar. Leiðin gongur til Port Williams og so til sonevndu Kaledonsku kanalina, sum gongur ígjøgnum Skotland. Johanna fer so í slúsurnar. Og Johanna endar so við kenda Loch Ness og Inverness. Johanna er væntandi aftur í Føroyum á leið tann 11. juli. Talan er um leigutúr við løgreglumonnum, men onnur enn løgreglufólk eru eisni við á ferðini. Johanna hevur 3 aðrar ætlaðar túrar á skránni í summar.

*Johanna TG326 stevndi út eftir Vágsfirði hóskvøldið (Mynd: Johs.Andreasen)*

# lkur ikki aftur




*Teir báðir sleipibátarnir hjá Tórshavnar Skipasmiðju togaðu Falk yvir at bedingini*




*Heykur fekk lítlan skaða av stoytinum og fer aftur til fiskiskap beinanvegin*



*Hans Jákup Olsen og sonurin Eirikur, sum var komin at taka ímóti pápanum*

# Eingin var bangin

Hans Jákup Olsen lá í koyggju síni umborð á Falki, tá skipið brádliga fekk ein stoyt, men í fyrstani helt hann ikki, at talan var um nakað álvarsamt. Tað var ikki fyrr enn teir sóu, hvussu nógvur sjógvur kom í lastina, at menninir varnaðust, hvussu álvarssom støðan veruliga var.

- *Var tú nakrantíð bangin?*

- Nei, tað var eg ikki, og eg haldi ikki, at nakar var bangin, segði Hans Jákup Olsen við Rás2, stutt eftir Falkur var komin at bryggju.

# Hetta var ikki tað vit høvdu brúk fyri

**Óhappið við Falki kemur Føroya Fiskavirking sera illa við**

Tað hevur gingið sera striltið at fáa gongd á raksturin hjá partarolarunum Falki og Heyki, síðani teir komu til landið stutt fyri jól í fjør.

Tá skipini høvdu verið til fiskiskap í tveir dagar, noyddust tey innaftur, tí alt riggaði ikki, sum tað skuldi. So fór Fiskimannafelagið í verkfall. Men fyrsti túrurin aftan á verkfallið gjørdist ikki drúgvari enn tann fyrsti, tí tá trolararnir høvdu roynt í tveir dagar, kom eldur í umborð á Falki. Síðani hava trolararnir verið til fiskiskap og hava fiskað væl, men nú liggja teir aftur.

- Tað kann ikki sigast annað, enn at vit hava verið stak óhepnir við hesum skipunum, og tað, sum nú hendi, var avgjørt ikki tað, sum vit høvdu brúk fyri, ásannar Meinhard Jacobsen, reiðari.

Nú vónar hann, at Fiskavirking kann finna ein tøkan partrolara, so Heykur kann sleppa aftur til fiskiskap.

- Tað ræður um at avmarka tann fíggjarliga missin mest møguligt, sigur Meinhard Jacobsen.



*Meinhard Jacobsen, stjóri í Fiskavirking, og Richard Mortensen, nevndarformaður, vóru komnir at taka ímóti skipunum*